# Vestmanna Kommuna

POSTBOKS 91 · FO-355 VESTMANNA

Kommunuskrivstovan tlf. 770100
Telefax nr. 770101
e-mail: vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo


# UMSÓKN UM FRÍPLÁSS

## - á dagstovni og í frítíðaransing, fyri tíðarskeiðið 1. august 2015 til 31. juli 2016

Umsóknin um fríplass skal latast inn til kommununa áðrenn 1. juli.
Verður umsóknin latin inn eftir henda dag, verður møgulig játtan galdandi frá 1. í mánaðinum eftir, at umsóknin er móttikin.
**Søkjast skal av nýggjum á hvørjum ári.**

**Upplýsingar frá umsøkjara**

| | |
|---|---|
| Navn umsøkjarans: | Føðingardagur og p-tal: |
| Bústaður: | Postnr. og bygd: |
| Telefon: Heima: Fartlf.: Arb.: | |
| Starv: | Hjúnastøða*: Stakur ☐ Giftur ☐ Sambúgvandi ☐ |
| *Tá støða skal takast til, um ein umsøkjari er einsamallur ella ikki, er bústaðurin í fólkayvirlitinum ikki avgerðandi, men um umsøkjarin livur saman við øðrum, sambúgvandi ella giftur, og er hetta eisini galdandi, hóast viðkomandi ikki er foreldur at barninum/børnunum. | |
| Navn á hjúnafelaga/sambúgva: | Føðingardagur og p-tal: |
| Bústaður: | Postnr. og bygd: |
| Telefon: Heima: Fartlf.: Arb.: | |
| Starv: | Tal á børnum undir 18 ár í húskinum: |
| Navn á barni/børnum:<br>......................<br>......................<br>......................<br>...................... | Føðingardagur og p-tal:<br>......................<br>......................<br>......................<br>...................... |
| Við umsóknini skulu fylgja nágreinilig yvirlit yvir inntøkurnar fyri seinasta ár og inntøkurnar higartil í ár. Hetta er eisini galdandi fyri hjúnafelagan, sambúgvan ella tí, sum umsøkjarin livur saman við. | |
| Eru inntøkuviðurskiftini í ár broytt í mun til seinasta ár?<br>......................<br>...................... | |
| Um umsøkjarin ella hjúnafelagin/sambúgvin er undir útbúgving<br>- nær verður hendan væntandi lokin? | |
| Er fríplass áður játtað barninum/børnunum?<br>Ja ☐ Nei ☐ | |
| Onnur viðurskifti, ið kunnu hava týdning fyri avgerð kommununar:<br>......................<br>......................<br>...................... | |

Vestmanna Kommuna
POSTBOKS 91 · FO-355 VESTMANNA

Kommunuskrivstovan tlf. 770100
Telefax nr. 770101
e-mail: vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

## Váttan frá umsøkjara og hjúnafelaga/sambúgva

Gjørt verður vart við, at tygum hava skyldu at boða frá broytingum í tygara/tykkara inntøkuviðurskiftum ella øðrum viðurskiftum, sum hava týdning fyri rættin til heilt ella partvís fríplass. Umsitingin eftirkannar regluliga við stakroyndum upplýsingarnar. Um tað seinni verður staðfest, at broytingar ikki hava verið fráboðaðar, kann fríplass játtað á skeivum grundarlagi verða kravt aftur. Í serliga álvarsligum førum kann málið verða latið løgregluni.

Umsókn um fríplass verður viðgjørd smb. kunngerð nr. 88 frá 17. juni 2009 um fíggjarligt fríplass. Kunngerðin við útrokningartalvu er hjálagt hesum umsóknarblaði.

Undirritaði váttar við hesum, at upplýsingarnar eru sannar.

Eg loyvi kommununi at útvega allar neyðugar upplýsingar um míni viðurskifti, herundir frá skattavaldinum.

...................................., tann / 20 ....... ........................................................ ........................................................

Staður — Undirskrift, umsøkjari — Undirskrift, hjúnarfelagi/sambúgvi

## Váttan frá Kommunuskrivstovuni

| Umsókn útflýggjað: | | Umsókn móttikin: | |
|---|---|---|---|
| ..................................... | ................................................ | .......................................... | ................................................ |
| Dagfesting | Váttan | Dagfesting | Váttan |

## Upplýsingar frá dagstovni/frítíðaransing

Navn á stovninum:

| Navn á barni/børnum: | Byrjað á stovni: |
|---|---|
| .................................................................................................... | ......................................... (d – m – ár) |
| .................................................................................................... | ......................................... (d – m – ár) |
| .................................................................................................... | ......................................... (d – m – ár) |
| .................................................................................................... | ......................................... (d – m – ár) |

Aðrar upplýsingar, ið kunnu hava týdning fyri avgerð kommununar:

....................................................................................................................................................................

....................................................................................................................................................................

....................................................................................................................................................................

Tann / 20 ....... ..........................................................

Undirskrift leiðarans

## Upplýsingar frá TAKS

Váttað verður, at skattskylduga inntøkan hjá frammanfyri nevndu fyri seinasta skattaár var:

| Navn og p-tal: | Skattskyldug inntøka:<br>Skattafrí inntøka: |
|---|---|
| Navn og p-tal: | Skattskyldug inntøka:<br>Skattafrí inntøka: |

og at tey 1. januar 200 .... høvdu ....... børn undir 18 ár heima.

tann / 20 ....... ..........................................................

Undirskrift leiðarans

Vestmanna Kommuna
POSTBOKS 91 · FO-355 VESTMANNA

Kommunuskrivstovan tlf. 770100
Telefax nr. 770101
e-mail: vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

## Útrokningartalva fyri frípláss á dagstovnum 1. august 2015 - 31. juli 2016

| Útrokningarinntøka | Gjald í % av fullum gjaldi |
|---|---|
| 0 kr. - 253.300 kr. | einki gjald |
| 253.301 kr. - 254.100 kr. | 5 % |
| 254.101 kr. - 254.900 kr. | 6 % |
| 254.901 kr. - 255.700 kr. | 7 % |
| 255.701 kr. - 256.500 kr. | 8 % |
| 256.501 kr. - 257.300 kr. | 9 % |
| 257.301 kr. - 258.100 kr. | 10 % |
| 258.101 kr. - 258.900 kr. | 11 % |
| 258.901 kr. - 259.700 kr. | 12 % |
| 259.701 kr. - 260.500 kr. | 13 % |
| 260.501 kr. - 261.300 kr. | 14 % |
| 261.301 kr. - 262.100 kr. | 15 % |
| 262.101 kr. - 262.900 kr. | 16 % |
| 262.901 kr. - 263.700 kr. | 17 % |
| 263.701 kr. - 264.500 kr. | 18 % |
| 264.501 kr. - 265.300 kr. | 19 % |
| 265.301 kr. - 266.100 kr. | 20 % |
| 266.101 kr. - 266.900 kr. | 21 % |
| 266.901 kr. - 267.700 kr. | 22 % |
| 267.701 kr. - 268.500 kr. | 23 % |
| 268.501 kr. - 269.300 kr. | 24 % |
| 269.301 kr. - 270.100 kr. | 25 % |
| 270.101 kr. - 270.900 kr. | 26 % |
| 270.901 kr. - 271.700 kr. | 27 % |
| 271.701 kr. - 272.500 kr. | 28 % |
| 272.501 kr. - 273.300 kr. | 29 % |
| 273.301 kr. - 274.100 kr. | 30 % |
| 274.101 kr. - 274.900 kr. | 31 % |
| 274.901 kr. - 275.700 kr. | 32 % |
| 275.701 kr. - 276.500 kr. | 33 % |
| 276.501 kr. - 277.300 kr. | 34 % |
| 277.301 kr. - 278.100 kr. | 35 % |
| 278.101 kr. - 278.900 kr. | 36 % |
| 278.901 kr. - 279.700 kr. | 37 % |
| 279.701 kr. - 280.500 kr. | 38 % |
| 280.501 kr. - 281.300 kr. | 39 % |
| 281.301 kr. - 282.100 kr. | 40 % |
| 282.101 kr. - 282.900 kr. | 41 % |
| 282.901 kr. - 283.700 kr. | 42 % |
| 283.701 kr. - 284.500 kr. | 43 % |
| 284.501 kr. - 285.300 kr. | 44 % |
| 285.301 kr. - 286.100 kr. | 45 % |
| 286.101 kr. - 286.900 kr. | 46 % |
| 286.901 kr. - 287.700 kr. | 47 % |
| 287.701 kr. - 288.500 kr. | 48 % |
| 288.501 kr. - 289.300 kr. | 49 % |
| 289.301 kr. - 290.100 kr. | 50 % |
| 290.101 kr. - 290.900 kr. | 51 % |
| 290.901 kr. - 291.700 kr. | 52 % |

| Útrokningarinntøka | Gjald í % av fullum gjaldi |
|---|---|
| 291.701 kr. - 292.500 kr. | 53 % |
| 292.501 kr. - 293.300 kr. | 54 % |
| 293.301 kr. - 294.100 kr. | 55 % |
| 294.101 kr. - 294.900 kr. | 56 % |
| 294.901 kr. - 295.700 kr. | 57 % |
| 295.701 kr. - 296.500 kr. | 58 % |
| 296.501 kr. - 297.300 kr. | 59 % |
| 297.301 kr. - 298.100 kr. | 60 % |
| 298.101 kr. - 298.900 kr. | 61 % |
| 298.901 kr. - 299.700 kr. | 62 % |
| 299.701 kr. - 300.500 kr. | 63 % |
| 300.501 kr. - 301.300 kr. | 64 % |
| 301.301 kr. - 302.100 kr. | 65 % |
| 302.101 kr. - 302.900 kr. | 66 % |
| 302.901 kr. - 303.700 kr. | 67 % |
| 303.701 kr. - 304.500 kr. | 68 % |
| 304.501 kr. - 305.300 kr. | 69 % |
| 305.301 kr. - 306.100 kr. | 70 % |
| 306.101 kr. - 306.900 kr. | 71 % |
| 306.901 kr. - 307.700 kr. | 72 % |
| 307.701 kr. - 308.500 kr. | 73 % |
| 308.501 kr. - 309.300 kr. | 74 % |
| 309.301 kr. - 310.100 kr. | 75 % |
| 310.101 kr. - 310.900 kr. | 76 % |
| 310.901 kr. - 311.700 kr. | 77 % |
| 311.701 kr. - 312.500 kr. | 78 % |
| 312.501 kr. - 313.300 kr. | 79 % |
| 313.301 kr. - 314.100 kr. | 80 % |
| 314.101 kr. - 314.900 kr. | 81 % |
| 314.901 kr. - 315.700 kr. | 82 % |
| 315.701 kr. - 316.500 kr. | 83 % |
| 316.501 kr. - 317.300 kr. | 84 % |
| 317.301 kr. - 318.100 kr. | 85 % |
| 318.101 kr. - 318.900 kr. | 86 % |
| 318.901 kr. - 319.700 kr. | 87 % |
| 319.701 kr. - 320.500 kr. | 88 % |
| 320.501 kr. - 321.300 kr. | 89 % |
| 321.301 kr. - 322.100 kr. | 90 % |
| 322.101 kr. - 322.900 kr. | 91 % |
| 322.901 kr. - 323.700 kr. | 92 % |
| 323.701 kr. - 324.500 kr. | 93 % |
| 324.501 kr. - 325.300 kr. | 94 % |
| 325.301 kr. - 326.100 kr. | 95 % |
| 326.101 kr. - 326.900 kr. | 96 % |
| 326.901 kr. - 327.700 kr. | 97 % |
| 327.701 kr. - 328.500 kr. | 98 % |
| 328.501 kr. - 329.300 kr. | 99 % |
| Hægri enn - 329.300 kr. | Fult gjald |

**Útrokningarinntøkan lækkar fyri hvørt heimabúgvandi barn yngri enn 18 ár, við barnaupphæddini, sum er kr. 12.888,00.**

Vestmanna Kommuna
POSTBOKS 91 · FO-355 VESTMANNA

Kommunuskrivstovan tlf. 770100
Telefax nr. 770101
e-mail: vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

## Kunngerð nr. 88 frá 17. juni 2009 um fíggjarligt fríplass

Við heimild í § 6a, stk. 2 og § 11, stk. 4 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006, verður ásett:

**Rætturin til fíggjarligt fríplass**
**§ 1**. Fult fíggjarligt fríplass kann játtast eftir dagstovnalógini § 6a, stk. 2 um inntøkugrundarlagið er undir 227.300 kr. Fyri hvørjar 1.000 kr. inntøkugrundarlagið er hægri enn 227.300 kr. lækkar fríplássið við 2%. Er inntøkugrundarlagið hægri enn kr. 272.300 kr. verður einki fríggjarligt fríplass latið.
*Stk. 2*. Inntøkumarkið sambært stk. 1 verður á hvørjum ári javnað við lutfalsligu lønarhækkingini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.
*Stk. 3*. Landsstýrismaðurin kunnger á hvørjum ári, í seinasta lagi 1. juni, í rundskrivi eina útrokningartalvu, sum vísir inntøkumarkið fyri fíggjarligum fríplássi, og hvussu nógv fíggjarligt fríplass kann játtast tí ávísa inntøkugrundarlagnum. Fyrsta áseting verður 1. juni 2010.

**§ 2**. Kommunan kann játta heilt ella partvíst fíggjarligt fríplass, um umsøkjarin prógvar, at inntøkugrundarlagið hjá húski umsøkjarans er lægri enn inntøkumarkið fyri fíggjarligum fríplássi.
*Stk. 2*. Inntøkugrundarlagið er inntøkan nevnd í § 3 lækkað við eini upphædd, ið svarar til tað vanliga barnagjaldið eftir løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl., fyri hvørt heimabúgvandi barn undir 18 ár.
*Stk. 3*. Húski sambært stk. 1 umfatar bæði foreldrini, um barnið býr saman við báðum foreldrum. Býr barnið saman við øðrum av foreldrunum og er foreldrið gift við ella livir saman við øðrum persóni, er hesin umfataður av húskinum. Liva foreldrini ikki saman, og býr barnið eins nógv hjá báðum foreldrunum, er húskið sambært stk. 1, har barnið hevur bústað sambært landsfólkayvirlitinum.
*Stk. 4*. Inntøka hjá barninum ella øðrum børnum í húskinum er ikki partur av inntøkugrundarlagnum hjá húskinum.

**§ 3**. Inntøka er:
1) Skattskylduga inntøkan sambært skattalógini.
2) Inntøka, ið er heilt ella partvís skattafrí sambært skattalógini, so sum DIS-inntøka.
3) Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku.
4) Uppihaldsveitingar sambært forsorgar-lógini, § 9, § 13, stk. 1 og § 18, stk. 1.
5) Barnaviðbót.
6) Barnagjald.
7) Lestrarstuðul.
8) Nettovinningur, ið er skattskyldugur sambært kapitalvinningsskattalógini.
9) Leiguinntøka.
*Stk. 2*. Inntøkutíðarskeiðið, sum avgerð um fíggjarligt fríplass verður grundað á, er inntøkan seinast farna skattaár (inntøkuár) ásett av líkningarmyndugleikanum. Um inntøkan broytist munandi í tíðarskeiðnum 1. august til 31. juli, kann avgerð um fíggjarligt fríplass grundast á eina metta ársinntøku, útroknaða við støði í inntøkuni í løtuni og mett frameftir.
*Stk. 3*. Sum skjalprógv fyri inntøkur sambært stk. 1, verða nýttar eitt nú uppgjørdar sjálvuppgávur og endauppgerðir frá TAKS, kontoavrit frá fyribilsskattaskránni hjá TAKS, váttan frá Stuðulsstovninum ella útlendskum stuðulsveitara um lestrarstuðul og váttan frá Almannastovuni um uppihaldsveitingar.
*Stk. 4*. Skattafríar inntøkur sambært stk. 1, nr. 2 – 7 skulu upproknast, soleiðis at tær svara til skattskylduga inntøku, eftir hesum upprokningarfaktorum:
1) Er nettoinntøkan lægri enn ella javnt við 29.000 kr. er upprokningarfaktorurin 1,03.
2) Er nettoinntøkan hægri enn 29.000 kr., men lægri enn ella javnt við 57.000 kr. er upprokningarfaktorurin 1,23.
3) Er nettoinntøkan hægri enn 57.000 kr., men lægri enn ella javnt við 97.000 kr. er upprokningarfaktorurin 1,44.
4) Er nettoinntøkan hægri enn 97.000 kr., men lægri enn ella javnt við 158.000 kr. er upprokningarfaktorurin 1,58.
5) Er nettoinntøkan hægri enn 158.000 kr., er upprokningarfaktorurin 1,58 upp til 158.000 kr., og 2,32 av restini.

**Umsókn og játtanarskeið**
**§ 4**. Umsókn um fíggjarligt fríplass skal latast bústaðarkommununi á umsóknarblaði, útvegað av kommununi. Á umsóknarblaðnum skal upplýsast tal av heimabúgvandi børnum undir 18 ár, inntøkan hjá húskinum og onnur viðurskifti, sum umsøkjarin heldur vera viðkomandi fyri viðgerðina av umsóknini.
*Stk. 2*. Fíggjarligt fríplass verður játtað eitt ár í senn, hvørt ár frá 1. august til 31. juli. Sbr. tó §§ 5 og 6.

**§ 5**. Tá barn byrjar á dagstovni ella dagrøkt, verður fíggjarligt fríplass játtað frá byrjanardegnum, um umsóknin verður latin inn í seinasta lagi ein mánað eftir byrjunardagin.
*Stk. 2*. Um umsókn verður latin inn seinni enn ein mánað eftir byrjanardagin, verður játtan av fríplássi galdandi frá 1. í mánaðinum eftir, at umsóknin er móttikin til komandi 31. juli.

**§ 6**. Umsókn um framhaldandi fíggjarligt fríplass, skal latast kommununi í seinasta lagi 1. juli.
*Stk. 2*. Um umsókn verður latin inn seinni enn 1. juli, verður játtan av fríplássi galdandi frá 1. í mánaðinum eftir, at umsóknin er móttikin til komandi 31. juli.

**Upplýsingarskylda, vegleiðing og afturvirkandi javning**
**§ 7**. Í játtanarskeiðinum hevur umsøkjarin skyldu til at boða kommununi frá varandi broytingum í inntøkuviðurskiftunum og øðrum viðurskiftum, ið skerja rættin til fíggjarligt fríplass.
*Stk. 2*. Foreldragjald kann javnast afturvirkandi til tað mundið, tá viðurskiftini hjá umsøkjaranum broyttust.
*Stk. 3*. Um varandi broytingar eru í inntøkuviðurskiftunum ella øðrum viðurskiftum, ið økja rættin til fíggjarligt fríplass, kann umsøkjarin lata nýggja umsókn inn. Umsóknin verður viðgjørd samsvarandi § 6, stk. 2.

**§ 8**. Umsøkjarin og viðkomandi dagstovnur ella dagrøkt skulu hava skrivlig boð um avgerðir um fíggjarligt fríplass.
*Stk. 2*. Kommunan skal kunna umsøkjaran um inntøkugrundarlagið, sum avgerðin um fíggjarligt fríplass er grundað á, og um skyldurnar sambært ásetingunum í § 7, stk. 1.

**§ 9**. Kommunan skal vegleiða foreldur, sum søkja um pláss á dagstovni ella dagrøkt, um møguleikan fyri fíggjarligum fríplássi.

Vestmanna Kommuna
POSTBOKS 91 · FO-355 VESTMANNA

Kommunuskrivstovan tlf. 770100
Telefax nr. 770101
e-mail: vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

**Kærumøguleiki**
**§ 10**. Avgerðir tiknar sambært hesi kunngerð kunnu, innan 4 vikur eftir at umsøkjarin hevur fingið fráboðan um avgerðina, kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum.
*Stk. 2*. Kærunevndin kann víkja frá hesi freist, um serlig orsøk er til tað.

**Gildiskoma**
**§ 11**. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2*. Kunngerðin hevur virknað fyri avgerðir um fíggjarligt frípláss fyri tíðarskeiðið 1. august 2009 og frameftir.
*Stk. 3*. Kunngerð nr. 72 frá 31. mai 2006 um fíggjarligt frípláss fer úr gildi 1. august 2009.

Almannamálaráðið, 17. juni 2009

Rósa Samuelsen (sign.)
landsstýriskvinna

Eyðun Mohr Hansen (sign.)

## Løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006
## um
## broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt

**§ 1** Í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt verður gjørd henda broyting:
Aftan á § 6 verður sett:

"**§ 6a.** Fíggjarligt frípláss, antin fult ella partvíst, kann veitast foreldrum, ið ikki sjálvi megna at rinda útreiðslurnar sambært hesi lóg. Útreiðslur fyri fíggjarligt frípláss verða rindaðar av avvarðandi kommunum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um fíggjarligt frípláss aftaná at hava ráðført seg við kommunurnar."

**§ 2** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2006.

Tórshavn, 9. mai 2006

**Jóannes Eidesgaard (sign.)**
løgmaður

/Hans Pauli Strøm (sign.)

Vestmanna Kommuna
POSTBOKS 91 · FO-355 VESTMANNA

Kommunuskrivstovan tlf. 770100
Telefax nr. 770101
e-mail: vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

Kunngerðablaðið A
2015
Givið út 29. mai 2015

Nr. 89 29. mai 2015

**Kunngerð um broyting í kunngerð um fíggjarligt frípláss**
(Hækking av inntøkumarki)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 88 frá 17. juni 2009 um fíggjarligt frípláss verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 1 verður orðað soleiðis:

"**§ 1.** Fult fíggjarligt frípláss kann játtast eftir løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt § 6 a, stk. 2 um inntøkugrundarlagið er 253.300 kr. ella lægri.

*Stk. 2.* Fyri inntøkur hægri enn 253.300 kr. til og við 254.100 kr. verður veitt 95% frípláss. Eftir hetta lækkar fríplássið við 1% fyri hvørjar 800 kr. inntøkugrundarlagið er hægri enn 254.100 kr.

*Stk. 3.* Inntøkumarkið sambært stk. 1 og 2 verður á hvørjum ári javnað við lutfalsligu lønarhækkingini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kunnger á hvørjum ári, í seinasta lagi 1. juni, í rundskrivi eina útrokningartalvu, sum vísir inntøkumarkið fyri fíggjarligum fríplássi, og hvussu nógv fíggjarligt frípláss kann játtast tí ávísa inntøkugrundarlagnum."

**2.** Í § 3, stk. 1 verða nr. 3 og 4 strikað.
Nr. 5-9 verða eftir hetta nr. 3-7.

**3.** Í § 3, stk. 3 verður "og váttan frá Almannastovuni um uppihaldsveitingar" strikað.

**4.** § 3, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Tá inntøkugrundarlagið verður uppgjørt, skulu skattafríar inntøkur sambært stk. 1, nr. 2-5 upproknast soleiðis, at tær samsvara við skattskylduga inntøku, og síðani leggjast afturat skattskyldugu inntøkuni."

**5.** Í § 3 verða sum stk. 5, 6 og 7 sett:

"*Stk. 5.* Er skattskylduga inntøkan 65.000 kr. ella hægri, verður funnið fram til inntøkugrundarlagið við at leggja afturat skattskyldugu inntøkuni eina upphædd samsvarandi við skattafríu inntøkuna faldað við 1,83.

*Stk. 6.* Er skattskylduga inntøkan lægri enn 65.000 kr., verður fyrst funnið fram til samlaða nettoinntøkugrundarlagið, og síðani verður inntøkugrundarlagið funnið við at upproknað samlaða nettoinntøkugrundarlagið til skattskylduga inntøku. Samlaða nettoinntøkugrundarlagið verður roknað soleiðis:

1) Er skattskylduga inntøkan hægri enn 30.000 kr., men lægri enn 65.000 kr., er samlaða nettoinntøkugrundarlagið nettoinntøkan umframt 75% av skattskyldugu inntøkuni umframt 6.300 kr.
2) Er skattskylduga inntøkan 30.000 kr. ella lægri, er samlaða nettoinntøkugrundarlagið nettoinntøkan umframt 96% av skattskyldugu inntøkuni.

*Stk. 7.* Samlaða nettoinntøkugrundarlagið sambært stk. 6 verður upproknað til skattskylduga inntøku soleiðis:

1) Er nettoinntøkugrundarlagið 28.750 kr. ella lægri, verður nettoinntøkugrundarlagið faldað við 1,04.
2) Er nettoinntøkugrundarlagið hægri enn 28.750 kr., men lægri enn 54.900 kr., verður nettoinntøkugrundarlagið faldað við 1,34, og síðani verður 8.500 kr. drigið frá.
3) Er nettoinntøkugrundarlagið 54.900 kr. ella hægri, verður nettoinntøkugrundarlagið faldað við 1,83, og síðani verður 35.400 kr. drigið frá."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. august 2015.

Almannamálaráðið, 29. mai 2015

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)